Oyggjablaðið

Mikudagur 9. februar 2011 · Nr. 17








**MUNUR Á**

*Millum hesar báðar myndirnar eru sløk 45 ár. Nógv er broytt hesi árini, sum myndirnar so greitt vísa - onnur tikin við flogfari og hin umvegis Google Earth*

# Autostrada

*Tann ið koyrir eftir Hoyvíksvegi í dag, dugir illa at ímynda sær tann gamla, smala, krókuta og stak óslætta vegin sum í roynd og veru bara endaði einastaðni.*
*Vegurin sum bæði gekk niður í lægdir og upp á bakkar endaði í roynd og veru bara í eini smalari rás. Hetta var eisini orsøkin til, at hann sjáldan varð grivin heilt at enda.*
*- Teir góvust ofta at grava við stoypivirkið ella kanska eitt sindur niðan um tað.*
*Tí máttu teir sum arbeiddu á Veðurstøðini seta bilar sínar har.*
*- Í dag er Hoyvíksvegurin sléttur og beinur, og er meiri at meta sum ein autostrada.*